

www.oljan.fo

**Jan Müller** 13 - 03 - 2013

# Yme-pallurin skal høggjast upp

Eftir kjak í mánaðir eru SBM (Single Buoy Moorings) og oljufelagið Talisman vorðin samd um, at oljupallurin Yme skal høggjast upp. Yme-pallurin varð bygdur í Abu Dhabi í 2010, men tað vísti seg, at tað vóru fleiri túsund brek og við honum. Seinasta summar gjørdist neyðugt at taka fólkið av pallinum, tí rivur vóru komnar í hann, og vandi var fyri, at hann holvdist. Avrátt varð at toga pallin av Yme-leiðini í Norðsjónum til lands. Upprunaliga var pallurin mettur at kosta 4,4 milliardir krónur, men sambært Teknisk Ukeblad kostaði hann 12 milliardir, tá hann loksins kundi takast í brúk. Um jóltíðir bórust tey fyrstu tíðindini um, at Yme-pallurin skuldi høggjast upp, men fyri fjúrtan døgum síðani ljóðaði, at Talisman umhugsaði at manna pallin aftur, um kanningar kundu vísa, at hann var tryggur. Men hesum fevur felagið nú slept. Eftir avtaluni millum partarnar skal SBM standa fyri upphøggingini.